# Styrki og kvikleiki á Føroya Sjómannadegi

**- Summar av kappingunum er ofta nokso "spontanar". Er luttøkan ikki nóg stór, rópa vit onkran upp, og soleiðis var við Karsteni Hansen í kappingini um at halda dreggi seinast. Hesaferð hevði verið stuttligt at fingið Tórbjørn Jacobsen við eisini, sigur kappingarleiðarin, Ólavur Poulsen**

SJÓMANNADAGUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ein av fleiri kappingum á Føroya Sjómannadegi er kappingin um at halda einum dreggi longst við strektum ørmum. Hetta er ikki nakar "kunstur" í sær sjálvum, og hetta er eisini ein kapping, ið øll kunnu luttaka í. Dreggið vigar 16 pund, so her ræður í fyrsta lagi um at halda út sum longst.

Maðurin, sum vann hesa kapping í fjør, Óli Skarðenni, verður helst ringur at syfta í ár.

Kappingarleiðarin, Ólavur Poulsen, sigur, at Óli, sum er seinast í tríatiárunum, er ógvuliga evnaríkur, men hann fekk rímiliga harða mótstøðu í fjør frá Karsteni Hansen, løgtingsmanni, sum avgjørt ikki er nakar píningur heldur.

- Slíkar kappingar eru ofta nokso "spontanar". Er luttøkan heldur lítil, rópa vit onkran upp, og soleiðis var við Karsteni Hansen í fjør. Hesaferð hevði verið stuttligt at fingið Tobba (Tórbjørn Jacobsen) við eisini, heldur Ólavur fyri.

Kappingin í at halda dreggi verður leygardagin klokkan 16.30.

### Sterkar manningar

Ein onnur kapping, sum hevur stóran áhuga millum fólk, og sum eisini hevur við styrki at gera, er togtoganin millum skipsmanningar.

Í 2005 endaði manningin á línuskipinum Ågot á øðrum plássi, men í fjør vunnu teir.

Fleiri dystir í togtogan vóru sera javnir í fjør, har drúgv løta gekk, áðrenn endaliga avgerðin fall.

Nú verður spennandi at vita, hvør stendur eftir sum vinnari í ár, tá kappingin er lokin.

10 mans eru á hvørjum enda.

Kappingin í togtogan verður leygarmorgunin klokkan 10.30.

### John og egning

Kappingin, sum kanska mest hevur verið umrødd í sambandi við Føroya Sjómannadag, er kappingin í egning.

Ungi maðurin, John Havn, sum er 32 ára gamal, hevur vunnið hesa kapping hini bæði fyrru árini, og aftur í ár er hann til reiðar at taka "dystin" upp.

Ólavur Poulsen sigur, at John Havn higartil hevur verið ringur at syft hjá avbjóðarunum, men tað eru teir, sum geva honum harða kapping.

- John hevur verið egningarformaður hjá útróðrarbáti, men í løtuni siglir hann við trolara. Hann er nýliga heimkomin og verður heima til kappingina í egning.

Tað, sum kappingarleiðarin ikki fortelur, nú Sosialurin prátar við hann, er, at John Havn í fjør vann í spennandi finaluni á júst Ólavi sjálvum – kappingarleiðaranum - og Poul Eli Jacobsen!

Nú er so spurningurin, um John megnar at vinna triðja árið á rað – ella um annar avbjóðari fer avstað við meistaraheitinum hesaferð.

Tað fáa vit at vita leygardagin klokkan 17.30.

### Áhugavert

Ólavur Poulsen sigur, at tað er ógvuliga áhugavert at skipa fyri Føroya Sjómannadegi – ikki minst tí, at fyrireikararnir møta stórari vælvild allastaðni, har teir koma.



*- Tað er ein serligur dámur og hugni yvir tiltøkunum og Klaksvíkini á Føroya Sjómannadegi, og her eru nógvar áhugaverdar og spennandi kappingar, sigur kappingarleiðarin, Ólavur Poulsen*

- Tiltakið hevur eydnast serstakliga væl hini bæði árini. Tað hevur verið ein serligur dámur og hugni yvir tiltøkunum og Klaksvíkini hesar dagar, og vit – eins og tey, sum komin eru at fylgja ymisku kappingunum – hava fingið nógvar, spennandi og áhugaverdar løtur, sigur kappingarleiðarin.



3. september

**Umsorganartrot hjá børnum**

- staðfesting og hjálp

Aftaná skeiðið, verður tú før/ur fyri, við eygleiðing, at kenna aftur ymisk tekin uppá umsorganartrot, umframt at tú lærir, hvussu tú á bestan hátt kann hjálpa hesum børnum.



4. september

**Terapi fyri børn**

- lat barnið siga sína søgu og møt børnunum á ein nýggjan hátt

Á skeiðinum fært tú innlit í ein viðgerðarhátt, sum ger tað møguligt at møta umsorganarsvíktum, traumatiseraðum eins væl og "vanligum" børnum á ein nýggjan hátt.

Á Skodsborg hava tey nýtt háttin gjøgnum 10 ár til øll børn sum koma inn.

*Tann 3 og 4. september 2007 verður kenda og sera dugnaliga Inger Thormann skeiðleiðari á tveimum viðkomandi skeiðum. Teknar tú teg til bæði skeiðini, fært tú serprís.*



8.-9. og 15.-16. september

**Tín framtíð sum drotning!**

- skeið í sjálvsmenning fyri kvinnur

Grundsjónarmiðið á skeiðnum er, at tað aldrin er nakað, sum er ov seint, ov vilt, ov vandamikið ella ov trupult. Vilt tú nakað nóg nógv, ber nærum alt til.

Kom við á Drotningaskeið - eitt vikuskiftisskeið í sjálvsmenning fyri kvinnur.

Pláss er bert fyri 20 luttakarum og verður skeiðið tí 2 ferðir.



17. og 18. september

**Starvsfólkahondbókin**

- eitt MUST úr HR-amboðskassanum

Set fokus á flextíð, avspáking, jarðarferðir, MUS osfr. Tú uppfinnur trúliga djúpa tallerkin hvørja ferð, fell ikki í fátt. Her er hjálp og inspiratión at heinta.

Sera lætt at implementa - tú fært eina skabelón av eini starvsfólkahondbók við tær á CD.

P.S. Miðalkarakterur fyri workshop í juni '07: 10,33 (eftir 13'skalanum).

Pláss er bert fyri 16 luttakarum og verður workshoppin tí 2 ferðir.



27. september

**Fá ein effektivan starvsdag**

- lær at raðfesta rætt, tá alt sýnist hava eins stóran týdning

Kennir tú tað aftur, stressið at skula náa alt, tú hevur sett tær fyri?

Hvussu í verðini skalt tú raðfesta uppgávurnar rætt? Allar sýnast hava bæði týdning og skund. Tú kemur ongantíð til tað, sum tú hevði sett tær fyri at avgreiða.

Kom og fá skil uppá tíðina!



29. – 30. september

**It takes two**

- ein íløga í parlagið

Uppliva tit, at tit eru fastløst í nøkrum heldur óhepnum mynstrum, og at tit ikki samskifta so væl, sum tit ynskja og/ella plagdu? Ella treingja tit bara til eitt lítið skump?
Tveir ógloymandi dagar fyri pør um m.a. jaliga kommunikatión og "hvussu-handfara-vit-ósemjur".

Set vikuskiftið 29. - 30. sept. av til parlagið - ein íløga, sum kann gerast besta íløgan, tit nakrantíð hava gjørt. Gisting og fullur kostur er íroknað.

Arbeitt verður bert við egnum maka - einki bólkaarbeiði. Pláss er bert fyri 14 pørum.

Synergi

Les meira og tekna teg á www.synergi.fo

Synergi • Tvørgøta 1 • 100 Tórshavn • Faroe Islands • synergi@synergi.fo • Tel. +298 22RING (227464) • Fax. +298 32BELL (322355)